gult2 cyan2 magenta2 svart2



gult3 cyan3 magenta3 svart3






Tá tú skalt gera íløgur í virðisbrøv, skalt tú hugsa teg væl um, tí hvør leikur hevur týdning. Kaupthing er til reiðar at seta saman íløguna, sum passar júst til tín tørv og títt lyndi - eina íløgu sum tú kanst vera tryggur við.

KAUPTHING
Føroyar
Virðisbrævameklarafelag
Tinghúsvegur 14 • FO-110 Tórshavn
tel. 35 1500 • fax 35 1501
www.kaupthing.fo

**Upplatingartilboð**

Vit hava umvælt og víðkað handil okkara, tískil lata vit 20% av øllum vørum, fríggjadagin 1. juni

Komið inn á gólvið og fáið eina góða leiðbeining

Opið er: Mánadag-hósdag kl. 10.00-17.30
Fríggjadag kl. 10.00-19.00
Leygardag kl. 10.00-14.00

SONJA DESIGN

# Stórt mannfall á Landsverkfrøðinginum

**Landsverkfrøðingurin er í trongum skóm. Seinasta hálva árið eru sjey verkfrøðingar í bestu árum farnir av stovninum. – Tá ein lítil helmingur av manningini er rýmdur av stovninum innan so stutta tíð, so er okkurt galið, sigur Suni Joensen, formaður í verkfrøðingafelagnum, sum fleiri ferðir hevur gjørt vart við trupulleikar á stovninum. Um nakrar dagar fer felagið at umrøða støðuna í almennum skrivi**

LANDSVERKFRØÐINGURIN
*Stefan í Skorini*

Alment eru teir farnir í farloyvi, men bert ein ella tveir vera aftur at síggja á stovninum. Teir sjey verkfrøðingarnir, ið eru farnir av Landsverkfrøðinginum seinastu seks mánaðirnar, og tað er ein lítil helvt av verkfrøðingunum. LV er sostatt at kalla í uppisetri fyri verkfrøðingar.

– Tað eru viðurskifti á stovninum, sum ikki eru nøktandi fyri limirnar hjá okkum, og felagið sær hetta sum eitt álvarsmál, sigur Suni Joensen, ið tó ikki sjálvur arbeiðir hjá Landsverkfrøðinginum.

Tað vóru nakrar bygnaðarbroytingar framdar, tá tann nýggi stjórin var settur, og Suni hevur varhugan av, at hesar broytingar eru orsøk til ta stóru burturferðina. Suni leggur afturat, felagið hevur nakað í umbúna næstu vikurnar.

– Skrivið verður ein staðfesting av støðuni, sum hon er nú. Tað er avgjørt ikki gott, at tað størsta almenna arbeiðsplássið missir so nógvar verkfrøðingar, og tað er álvarsamt, sigur Suni.



*Støðan á Landsverkfrøðinginum er út av lagi vánalig, tí fleiri verkfrøðingar eru farnir í bestu árum*
Mynd: Jens Kr. Vang

## Onga framtíð

Suni greiðir frá, at felagið fleiri ferðir hevur vent sær til avvarandi myndugleikar, men tað hevur ongantíð fingið nakað nøktandi svar, og ongar av teimum tilráðingum, sum felagið hevur mælt til eru fylgdar.

– Eftir øllum at døma eru bygnaðarbroytingarnar kroystar omanyvir høvdið á fólki, og tað ger, at tey rýma. Vit hava tí heitt á myndugleikarnar um at fylgja starvsfólkapolitikkinum hjá Løgmansskrivstovuni, tá bygnaðarbroytingar verða gjørdar. Vit hava heitt á teir røttu stovnarnar men til fánýtis, sigur Suni Joensen.

– Hetta tann stovnurin, sum skal halda eygað við byggivirkeminum hjá tí almenna, og tá teir missa so nógv fólk, og tað er tað unga fólkið í rýmir, so er ikki líkt til, stovnurin hevur nakra framtíð, sigur Suni Joensen.

Tær bygnaðarbroytingarnar, sum eru framdar, hava broytt umstøðurnar hjá fólki so nógv, at tey ikki trívast at, og tí tey eru rýmd, metir formaðurin.

Suni metir ikki, at hetta hevur samband við uppsøgnina av Henningi Jacobsen, tí tann søgan er farin.

Verkfrøðingafelagið fer at viðgera støðuna á fundi í næstu viku, síðani verður skriv sent út.

Stjórin á Landsverkfrøðinginum:

# Stovnurin stendur fast

**Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverkfrøðinginum, heldur ikki at støðan er út av lagi vánalig á stovninum, og bygnaðarbroytingarnar eru gjørdar á ein demokratiskan hátt. Hann eftirlýsir tó nakað ítøkiligt í sambandi við ónøgdina hjá Verkfrøðingafelagnum**

LANDSVERKFRØÐINGURIN
*Stefan í Skorini*

– Eg haldi, at stovnurin er í eini støðugari legu í løtuni, er viðmerkingin hjá Oyvindi Brimnes, stjóra á Landsverkfrøðinginum til, at sjey verkfrøðingar eru farnir av stovninum.

Hann metir ikki, at allir sjey kunnu bólkast í einum, tí nakrir hava boðað frá, at teir ætla sær aftur á stovnin, tá farloyvi er at enda komið. Oyvindur metir sostatt ikki, at farloyvini eru at meta sum uppsagnir.

## Demokratiskar broytingar

Tá Oyvindur varð settur sum stjóri fór hann undir at fremja nakrar bygnaðarbroytingar, sum hóskaðu betur til stovnin.

– Bygnaðarbroytingarnar vórðu framdar á ein ógvuliga demokratiskan hátt, vildi eg mett. Øll starvsfólkini fingu møguleikan at siga sína hugsan um broytingarnar, og tær vóru í trá við starvsfólkapolitikkin, sigur Oyvindur Brimnes.

Hann viðurkennir tó, at nakrir av verkfrøðingunum eru farnir av stovninum vegna ónøgd.

– Tá bygnaðarbroytingar verða framdar, so verður tað altíð so, at onkur er ónøgdur. Onkrir verkfrøðingarnir, sum ikki kundu laga seg til tær nýggju umstøðurnar, hava valt at fara úr starvi.



*Oyvindur Brimnes metir ikki, at stovnurin er óstøðugur, nú sjey verkfrøðingar eru farnir í farloyvi seinasta hálva árið*

Hóast stórt mannfall metir Oyvindur, at stovnurin megnar at røkja sínar uppgávur til fulnar.

## Eftirlýsir nakað ítøkiligt

Suni Joensen, formaður í Verkfrøðingarfelagnum, førir fram, at okkurt er galið á stovninum, tá so nógvir av limunum rýma, men hesum vísir Oyvindur aftur.

– Tað veldst um orsøkirnar til fráfallið. Eg eri sannførdur um, at ikki allir av hesum verkfrøðingunum eru farnir vegna ónøgd, og vit hava sett fýra nýggjar hesa tíðina.

Hann eftirlýsir samstundis nakrar ítøkiligar atfinningar frá Verkfrøðingafelagnum, tí enn sigur hann seg ikki hava fingið nakað skrivligt frá teimum. Hann leggur samstundis dent á, at hann fegin vil hava gott samband við felagið.

Formaður felagsins hevur boðað frá, at tað fer at almannakunngera eina yvirlýsing í næstu viku í sambandi við støðuna á Landsverkfrøðinginum. Tá fer Oyvindur óivað at svara aftur.

Oyvindur sigur um stovnin, at tey eru farin at seta út í kortið, hvussu arbeiðið skal leggjast til rættis í framtíðini. Hann hevur góðar vónir fyri framtíðina, og nógvar stórar uppgávur standa fyri framman.

Verð MOUS-meistari til jóla

Byrja viku 22 - enda viku 47

formula.fo